# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Gjógvin í samfelagnum fer at víðkast, tá ið eitt so virðismikið tilfeingi verður misjavnt býtt millum føroysku borgararnar. Haraftrat er hetta, at nakrir fáir føroyingar kunna selja tað livandi tilfeingið og koyra peningin í lumman, ikki í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap, tí har verður ásett, at Føroya fólk eigur tað livandi tilfeingið*

*Róar Akralíð skrivari í Búskaparráðnum*

## Lata upp nýggjar dyr til Europa

Tað er einki minni enn ein kollvelting, tá Smyril Line í summar letur upp einar heilt nýggjar dyr til umheimin ella rættari Evropa. Sigling uppá Skotland fer at skapa heilt nýggjar møguleikar fyri føroyingar og eisini fyri bretar og aðrar evropearar. Henda nýggja farleið ella um tú vil brúgv millum Tórshavn og Scrabster kann fáa stóran týdning fyri føroyska búskapin komandi árini, nógv størri enn vit geva okkum fær um nú.

Fyri tað fyrsta sleppa føroyingar nú við egnum bili og motorsúklu til Stórabretlands, sum er eitt ótrúligt land at ferðast í. Skotland, Ongland og Wales eru perlur í ferðamannahøpi, har tú fær bæði sól, mentan og annað ríkidømi. Bretland er so eisini at meta sum ein lopfjøl víðari út í tað stóra Evropa.

Og vit kunnu venda hesum á. Fyri skotar, bretar, walisar og aðrar evroperarar gerst brúgvin millum Scrabster og Tórshavn ein einastandandi møguleiki at uppliva Føroyar og Ísland.

Eitt eru so ferðafólkini. Vit skulu so heldur ikki gloyma handils- og vinnulívsfólkini og somuleiðis tey, sum fáast við mentan og list. Nýggja farleiðin gevur øllum hesum mongu nýggjar møguleikar og avbjóðingar. Hugsast kann eisini, at henda farleið kann fáa stóran týdning fyri okkara inn- og útflutning.

Tað eru mong ár síðani, at vit høvdu eina líknandi brúgv millum Tórshavn og Aberdeen. Lat okkum fegnast um, at góðar kreftir her á landi við Smyril Line á odda nú hava tikið stigið aftur at binda okkum og Stórabretland og harvið Evropa tættari saman. Hetta kann bara koma at gagna okkum øllum.

Tað er eisini gott og sunt, at vit ikki nærum bara hava ta einu dyrnar til umheimin, nevniliga gjøgnum Danmark. Alt gott um hana, men heimurin broytist og vit mugu troyta aðrar og nýggjar møguleikar. Føroyar og føroyingar mugu til at hyggja í allar ættir. Vit mugu skapa nýggj sambond og vit mugu fáa íblástur úr øllum herðashornum. Góða og tætta sambandið til Danmarkar er og verður. Tað ræður nú um at víðka sjónarringin mentanarliga, handils- og vinnuliga og eisini politiskt og samfelagsliga. So tað verður sera spennandi at síggja, hvussu fer at ganga við nýggju sjóbrúnni millum Føroyar og Stórabretland. Gott í tykkum, sum hava tikið hetta fyri tjóðina skilagóða stigið, tí hon snýr seg í veruleikanum um nógv meira enn bara at menna ferðavinnuna.

**Sosialurin**

# Veljarakanning: Gott úrslit fyri Javnaðarflokkin

JOHN JOHANNESSEN
løgtingslimur



**Veljarin hevur merkt politisku avrikini. Javnaðarflokkurin er størsti flokkurin í samgonguni og næststørsti flokkurin á tingi í nýggjastu veljarakanningini, sum Gallup hevur gjørt fyri Kringvarpið. Meðan Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin standa til at missa hvør sín tinglim, varðveitir Javnaðarflokkurin sínar sjey. Vit eiga tó ikki at hvíla við hetta úrslitið, men at halda á at prógva virðið í einum samhaldsføstum samfelag.**

Ein virkisfýsnari politiskur leiklutur og betri skipað floksapparat eru uttan iva partar av orsøkini til, at Javnaðarflokkurin hóast nógvar ákoyringar sum stjórnarberandi flokkur varðveitir sína styrki á sama støði sum á seinasta løgtingsvali.

Og so eru tað veruligu politisku úrslitini, ið eisini eru farin at síggjast og merkjast.

Í samgongu hevur millum annað eydnast Javnaðarflokkinum:

- At seta lóg um felags foreldramyndugleika í gildi í Føroyum.
- At hækka stuðulin til forsyrgjarar í útbúgving við 700 krónum um mánaðin.
- At seta á stovn barsilsskipan fyri foreldur í útbúgving.
- At fáa hækkað útgjaldið úr Samhaldsfasta úr 697 krónum um mánaðin í januar 2004 til 2.200 krónur um mánaðin í januar 2008, soleiðis at Samhaldsfasti og fólkapensjónin tilsamans koma uppá 9.345 krónur um mánaðin fyri støk og 15.633 krónur um mánaðin fyri hjún, har bæði eru pensjónistar.
- At fáa sett meira orku av til fólkaskúlan og harvið okkara framtíðar tilfeingi.
- At seta umhvørvis- og orkumál á politisku dagsskránna.
- At skapa ein veruligan granskingarpolitikk við øktari játtan.
- At fáa sjálvstýrismálið í fasta legu fram ímóti størri sjálvbjargni.
- At skapa trygg og stabil politisk viðurskifti við Javnaðarleiðslu.
- At fáa yvirtikið og útbygt flogvøllin
- At fáa vent búskapargongdini positiva vegin.
- At seta altjóðagerðina á dagsskrá í føroyska politiska umhvørvinum.

**Vinstravend úrslit**

Tí ber av røttum ikki til at halda fram at siga, at Javnaðarflokkurin ikki ger annað í samgonguni enn at tæna tveimum borgarligum flokkum. Uttan iva eru tað úrslitini, ið veljararnir hava lagt til merkis og tí ikki longur trúgva uppá herróp andstøðunar, um at Javnaðarflokkurin er í lummanum á Fólkaflokkinum.

Tað eru nevniliga júst teir báðir borgarligu flokkarnir, ið hava størstu afturgongdina í veljarakanningini. Sambandsflokkurin fer úr 23,7 prosentum á løgtingsvalinum niður á 19,5 prosent í veljarakanningini og missir eitt tingumboð. Fólkaflokkurin fer úr 20,6 prosentum á løgtingsvalinum niður á 18,7 prosent í veljarakanningini og missir eitt tingumboð.

Andstøðuflokkarnir, Miðflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, hava náttúrliga eina framgongd, har Tjóðveldisflokkurin økir um tingfólkatalið við einum umboði og Miðflokkurin við tveimum. Tað seinna má sigast at vera merkisvert, tá hugsað verður um, hvussu Miðflokkurin rekst frá hugsjón til hugsjón og misnýtir kristindómin og annað mangt fyri at vinna sær vald.

Javnaðarflokkurin varðveitir sambært veljarakanningi síni sjey umboð á tingi, hóast flokkurin fer úr 21,8 prosentum á løgtingsvalinum niður á 21,1 prosent í veljarakanningini.

**Mugu styrkja profilin**

Samanumtikið er veljarakanningin kortini eitt ógvuliga gott pappír fyri Javnaðarflokkin. Men skal flokkurin varðveita støðuna og enntá ganga fram, er týdningarmikið, at vit halda fram at prógva okkara virði og alsamt stríðast fyri eitt samfelag grundað á samhaldsføstu hugsjónina.

Ein tann fyrsta avbjóðingin fyri framman er at halda fast við, at ognarrætturin til fiskiríkidømið er almennur og harvið og Føroya Fólks, nú landsstýrismaður Sambandsfloksins hevur lagt uppskot fyri tingið við ábendingum um tað øvugta.

Harumframt er neyðugt, at vit styrkja støðu okkara munandi innan mentanar, útbúgvingar og skúlaøkið.

## Viðmerking til grein í Dimmalætting 21/5-07

# Venjarin Go home!

RANDI Í JÓGVANSTOVU
Sporamørk 20,
Leirvík 520



Vit kunnu als ikki góðtaka tín atburð, tú gert okkum øllum fyri skommum. Tú ert venjari fyri okkara felag, og tá vit koma kring landið fara fólk at halda, at vit í Leirvík taka undir við tínum andstyggiligu sjónarmiðum. Tú sigur *"At eg fekk karantenu ger bara, at eg hati útlendskar leikarar enn meira"*. Hevur tú als ikki gjørt tær greitt, hvussu nógv fólk títt hatur rakar?

Fyri fyrst skal eg minna teg á, at tá tú ert staddur í Leirvík, ert tú í einari bygd, sum helst hevur borgarar úr mestsum hvørjum króki í heiminum. Vit eru heilt nógv sum eru *"ikki føroyingar"*. Í Leirvík hava vit eisini verið so heppin, at vit eiga nógv børn, sum ikki eru av føroyskum uppruna, og vit eru minst líka erpin av teimum, sum vit eru av teimum føroysku børnunum, bara so tú veitst tað.

Fyri tað næsta kunnu vit ikki hava ein venjara, sum ber seg at sum tú gert. Títt hatur eigur undir ongum umstøðum at vera sátt millum ungdómin í Leirvík. Tú sigur, at hattar er *harmleyst slang* í Klaksvík, men tað er tann vánaligasta umberingin eg enn havi hoyrt. Tú eigur sjálvsagt at taka frástøðu frá slíkum atburði.

Eg haldi, at tú skalt gera LÍF ein seinasta beina, og tað er at fara inn aftur um Klakk og tað rættiliga skjótt. Eg verði ikki millum áskoðararnar so leingi sum tú umboðar LÍF og Leirvíkar bygd.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13³⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.